# Lesnaður til stór og smá børn



Til tey eitt sindur eldri børnini hevur Bókadeildin givið út myndabókina: Tá eg var sjórænari. Lítli Jákup Jerimias, sum spælir á Leynasandi, kemur út fyri tí heilt ónatúrliga, at eitt sjórænaraskip stevnir inn ímóti landi, og mamma og pápi hansara fylgja sjálvandi ikki við og síggja einki

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur í hesum døgum givið fleiri forvitnisligar bøkur út. Til tey smæstu eru tað bøkurnar »Mamma, hvar ert tú« og »Lóa í bað«**

BARNABØKUR

»Mamma, hvar ert tú« er eftir kenda danska myndprýðaran Birde Poulsen. Tann, ið leitar eftir mammu síni, er ein lítil fílur. Birde Poulsen er kend fyri at duga sera væl at tekna dýr.

Teknikkurin, hon nýtir, er fyrst og fremst akvarell og blýantur. Ofta málar hon vátt í vátt og slær salt í tað váta akvarellið fyri at fáa eitt serligt eyðkenni fram. Eftir lokið studentsprógv, búði Birde Poulsen eitt ár í Føroyum, og her setti vætan og tokan í føroyska náttúruni ferð á hugin at mála akvarellir.

Í bókini verður søgan um fílin søgd í myndum, heldur enn við orðum, og hóast myndirnar síggja natúrligar út, so eru tær tað ikki heilt.

Dýrini fáa ein lítið sindur størri høvd ella eygu, rørslurnar eru øðrvísi, tey hava nakað menniskjaligt yvir sær, sum ikki sæst í náttúruni. Tekningarnar hjá Birde Poulsen fær okkum at skilja, hvat dðrini hugsa og siga. Bókin kostar 40 kr

**Lóa í bað**

Lene Fauerby hevur skrivað bókina »Lóa í bað« og Mette-Kirstine Bak hevur teknað. Hon er um Lóu, sum skal vitja ommu sína og tí noyðist í bað og at pynta seg. Øll vita, hvussu kalt tað er at koma úr baðikarinum, men Lóa er ikki ráðaleys og loysir henda trupulleika á ein hátt, sum kanska ikki hóvar pápanum so væl.

Bøkurnar um Lóu eru nógv avhildnar. Higartil eru fýra bøkur um Lóu komnar frá Bókadeildini. Bókin Lóa í bað kostar 40 kr.



*Hendan bókin um Lóu er um ta ferðina, hon skal vitja ommu sína. Tí noyðist hon í bað og at pynta seg. Øll vita, hvussu kalt tað er at koma úr baðikarinum, men Lóa er ikki ráðaleys og loysir henda trupulleika á ein hátt, sum kanska ikki hóvar pápanum so væl*

**»Tá eg var sjórænari«**

Til tey eitt sindur eldri børnini hevur Bókadeildin givið út myndabókina: Tá eg var sjórænari. Lítli Jákup Jerimias, sum spælir á Leynasandi, kemur út fyri tí heilt ónatúrliga, at eitt sjórænaraskip stevnir inn ímóti landi, og mamma og pápi hansara fylgja sjálvandi ikki við og síggja einki.

Sjórænararnir síggja, hvussu væl drongurin dugir at grava, og tí má hann sjálvandi við teimum at hjálpa til at grava ein skatt niður. Bókin er sera stuttlig at lesa fyri børnum og byggir á, at hugflogið hjá børnum er líka so natúrligt sum veruleikin. Amerikanski barnabókarithøvundin Melina Long hevur skrivað bókina og David Sahnnon hevur myndprýtt. Sjálv sigur Melina Long um sjórænarar, at teir eru øgiliga kulir. Teir gera, sum teir vilja alla tíðina, hugsa ikki um tannrøkt, kolestrol og at vera politiskt korrektir.

Sjúrður Gullbein hevur týtt bókina, og hon kostar 90 kr.




